# Agger til Milan

Sambært danska Tipsbladet er tað sera sannlíkt, at Daniel Agger alt fyri eitt skiftir úr enska Liverpool til italska AC Milan. Alment vil eingin partur gera viðmerkingar til møguliga handilin, men danska blaðið skrivar, at partarnir í dag skriva undir ein fýra-ára sáttmála, sum samtundis flytur 60 milliónir krónur úr kassanum hjá Milan til Liverpool. Verður handilin veruleiki, gerst Daniel agger sætti danin í italska stórfelagnum.



# Simultan-bridge leygardagin

Komandi leygardag verður árliga Simultankappingin spæld, tað verður eins og seinastu árini Føroya Bjór, sum stuðlar við vinningum til tey vinnandi pørini á hvørjum spælistað. Byrjað verður klokkan 14 á ymsu støðunum, og skal tilmelding fara fram í seinasta lagi 10 minuttir undan kappingarbyrjan. Støðini, har spælt verður, eru í Vági, Klaksvík og í Havn.

Neistin-KÍF 27-29 (11-13):

# KÍF ávegis sensatiónini

**Púrasta óvæntað koppaðu kollfirðingar Neistanum, og nú stendur KÍF við bestu kortunum undan seinnu hálvfinaluni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Kanska verður steypakappingin í ár møguleikin, har KÍF veruliga kann sláa sítt navn fast í føroysku hondbóltshagtølunum.

Kollfirðingar vórðu langt ífrá roknaðir millum favorittarnar undan kappingini. Men í fjórðingsfinaluni bastu teir favorittunum úr H71, og nú hálvfinaluuppgerðin móti Neistanum er hálvrunnin, stendur KÍF við betru kortunum.

### Skrædnaði móti dystarenda

Og tað var við einum framúr stríðsavriki, at tað eydnaðist hjá KÍF at koppa Neistanum.

Heimaliðið helt seg annars hava gjørt nóg mikið, tá teir fyrstu løtuna eftir steðginum koppaðu eini hóttandi leiðslu hjá útiliðnum.

Við bara 19 minuttum eftir at spæla stóð 20-17 á máltalvuni, men so gekk alt brádliga heilt galið hjá vertunum. KÍF hevði nevnliga als ikki ætlanir um at gevast, og næstu løtuna vundu teir burtur úr vertunum, sum hálva vegna fóru í coma av óvæntaðu endurreisnini.

Og hóast Neistin seinastu løtuna fekk pyntað nakað um, soleiðis at munurin »bert« gjørdist tvey mál, so nart hetta ikki við fagnaðin hjá gestunum. Sjálvandi vita teir, at arbeiðið bara er hálvgjørt enn, men ein góð byrjan er nú heldur ikki at forakta.

### FAKTA um dystin

**Neistin-KÍF 27-29 (11-13)**
**10 min:** 6-2
**20 min:** 9-8
**40 min:** 19-17
**50 min:** 22-24
**Málskjúttar**
**Neistin:** Blagoje Buha 6(2), Tróndur Kragesteen 6, Finnur Hansson 6(1), Áki Mørk 3, Bogi Berg 3, Jugoslav Djumic 2, David Edvardsen 1
**KÍF:** Rógvi Weihe 7(1), Arnbjørn Hansen 7, Regin Dam 3, Ási Dam 5(3), Andreas Nielsen 2, Tony Weihe 1, Jákup Trúgvason 1
**Brotskøst:** Neistin 4, KÍF 5
**Útvísingar:** Neistin 4, KÍF 4
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen

### Tvær hálvfinalur í kvøld

Aftur í kvøld eru tvær hálvfinalur á skránni í Coca-Cola kappingini í hondbólti. Hjá monnum spæla Kyndil og StÍF í Havn, og byrjar tann dysturin klokkan 19.15. Og hjá kvinnunum hevur Stjørnan heimavøll í fyrru hálvfinaluni móti Neistanum. Tann dysturin byrjar klokkan 20.

**-mørk**

# Stór føroysk luttøka í Reykjavík International

**Um vikuskiftið verður stóra svimjikappingin Reykjavík International**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Svimjisamband Føroya sendir eitt talentlandslið við 13 svimjarum avstað. Umframt hesi trettan luttaka eisini Suðuroya Svimjifelag og Havnar Svimjifelag. Úr HS eru 9 svimjarar og úr Susvim eru 15 svimjarar, so tilsamans eru 37 føroyskir svimjarar í kapping í Laugardalshøllin

### Tríggjar heimsstjørnur til Reykjavíkar

Í ár er svimjikappingin partur av einum størri tiltaki, ið fevnir um fleiri ítróttagreinir. Føroyingar hava luttikið í hesari kapping í fleiri ár og við góðum úrslitum. Á heimasíðuni hjá svimjifelagnum Ægir í Reykjavík, ið fyriskipar svimjikappingina kunnu vit lesa, at tríggjar heimsstjørnur luttaka í kappingini. Tær eru norsku Alexander Dale Oen og Sara Nordenstam, ið bæði eru heiðursmerkjavinnarar frá olympisku leikunum í Beijing. Triðja heimsstjørnan er okkara egni Pál Joensen, ið millum annað skal svimja 1500 frísvimjing. Um Pál skrivar Ægir á heimasíðuni: „Frá Færeyjum heimsækir okkur aftur ein hann er einn besti og efnilegasti langsundmaður Evrópu í dag." Stór orð frá okkara grannum „Úr Føroyum vitjar okkum aftur ein tann besti og evnaligasti langteinasvimjarin í Evropa í dag!"

Kappast verður fríggjadag kl. 16.30, leygardagin innleiðandi kl. 9.15 og finalur kl. 16.30, sunnudagin innleiðandi kl. 9.15 og finalur kl. 16.00. Allir teir stuttu teinarnir svimja tey við innleiðandi og finalum, meðan kappingarnar frá 400 og uppeftir eru sum beinleiðis finala, við skjótasta riðli seinnapartar.

### Talentlandsliðið

Svimjisambandið fór í desember 2008 undir miðvíst talent/ungdómsarbeiði. Fyrsta tiltakið var ein venjingarlega í Klaksvík, og er luttøkan í Reykjavík ein partur av hesum arbeiðinum. Í hesum kappingarárinum er eisini ætlanin at hava tvær venjingarlegur afturat.

Talentlandsliðsvenjararnir Jóhan Martin Poulsen og Rúni Gaardbo úttóka á venjingarlegu í Klaksvík í 2008 trettan svimjarar at umboða Føroyar á Talentlandsliðnum. Teir eru: Úr Svimjifelagnum Flot: Astrid Foldarskarð og Birita Debes. Úr Fuglafjarðar svimjifelag: Poula Ø. Mohr og Hildur á Fløtti. Úr Svimjifelagnum Ægir: Monika Biskopstø, Cecilia Eysturdal, Bjarni M. Petersen. Úr Havnar Svimjifelag: Bjørg Seloy, Dagmar M. Winther og Magnus Jákupsson. Úr Suðuroyar Svimjifelag: Katarina S. Lamhauge, Helena Sævarsdóttir og Jón Hofgaard.

Á myndini vanta Helena S. Sævarsdóttir og Hildur á Fløtti. Leiðarar á ferðini eru Jórun Eið Johannesen og Palli Eysturberg.



*Fremstu føroysku svimjararnir taka um vikuskiftið lut í altjóða kapping í Reykjavík*